

# FÖROYA KVÆÐI til Föroya fólk – ein tjóðskaparlig fólkaútgáva

Nú 20 bind av FÖROYA KVÆÐI eru komin, stendur tygum í boði at ognast öll hesi bindini í senn eftir treytunum, sum standa á Bíleggingarseðlinum.




Bókagarður vil takka öllum, sum longu hava ognast tey útkomnu fyrstu 20 bindini og harvið hava styðjað útgávuni frá byrjan.
Ráðini hjá fólki eru tíbetur batnað tey seinastu árini, og tí er at vóna, at hetta tilboð frá Bókagarði kann hava áhuga hjá öðrum, sum vilja ognast hesa prýðiligu heildarútgávu av FÖROYA KVÆÐI.

BÓKAGARÐUR fór í 1998 undir nýggja útgávu av okkara mæta og háttmetta bókmentaliga gripi: FÖROYA KVÆÐI – CORPUS CARMINUM FÆROENSIUM (CCF). Tiltakið hevði tá, orsakað av fíggjarkreppu landsins, verið seinkað nökur ár, men kom umsíðir í gongd og hevur síðan gingið eftir ætlan.
Við hesi nýútgávu hevur tilætlanin verið og er: at veita Föroya fólki úti um landið lagaligan möguleika og hövi til sjálvt at kunna ognast henda okkara föroyska bókmentagrip sum tjóðskaparliga fólkaogn.
Tá farið var í holt við hetta stóra tiltak, varð fólk kunnað um útgávuætlanina, sum var soleiðis lögd til rættis, at kvæðini skuldu prentast í 40 bindum, og at 5 bind skuldu koma út í senn við ávísum millumbilum. Soleiðis hevur verið farið fram síðan 1998 og eru 20 tey fyrstu bindini útkomin. Sostatt er nú helmingurin prentaður.
Útgávan er í prýðiligum skreytbindum, ið eru snotilig og vökur, og prentverkið er somuleiðis dygdargott eins og onnur bókaverk, ið BÓKAGARÐUR gjögnum árini hevur latið koma út á prenti, altíð hava kunnað bjóðað seg fram við bestu dygd til keyparar og lesarar.
Um kvæðatilfarið er at siga, at tann fyrra útgávan av CCF varð prentað í Keypmannahavn í tíðarskeiðinum 1941–72. Tað vóru Chr. Matras og Nap. Djurhuus, sum greiddu útgávuna til prentingar og lótu tilfarið koma út í 6 stórum bindum. Tað var Universitets-Jubilæets danske Samfund, sum stóð fyri útgávuni. Danska ríkið, Föroya Lögting og Carlsberggrunnurin bóru kostnaðin tá.
Mótsett teirri fyrru útgávuni ber BÓKAGARÐUR allan kostnaðin av hesi nýggju uttan nakran almennan ella privatan studning. Samtíðis hevur dentur verið lagdur á at halda prísin á bókunum so langt niðri, sum tað yvirhövur hevur kunnað latið seg gjört, so at tað vanliga fólkið úti um landið kann hava sæð seg fört fyri at útvega sær kvæðini sum heildarútgávu.
Útgávuarbeiðið heldur fram í hesum ári, og hildið verður á, til alt verkið um ikki langa tíð er útkomið.
Tá ið farið varð undir at fyrireika útgávuna fyrst í áttatiárunum, mælti táverandi lektari, seinni professari við Fróðskaparsetur Föroya, Mortan Nolsöe, til at umskipa kvæðatilfarið, so at tað kom at standa saman í skipaðum bólkum. Hesi ráð vórðu fylgd, og hesir bólkar, sum eru 7 í tali, eru: 1) kappakvæði, 2) halgikvæði, 3) náttúrukvæði, 4) riddarakvæði, 5) sannsögukvæði, 6) skemtikvæði og 7) tættir. Annars verður teksturin úr teirri fyrru útgávuni endurprentaður við somu stavseting, sum nýtt var tá, óbroyttari.
Í hesi nýggju útgávuni av CCF er í tí fyrsta bindinum settur inngangur, sum lærari, cand. psyk. Dánial Niclasen (1914–91) skrivaði fyri BÓKAGARÐ. Har er sagt frá um kvæðayrking, rím og niðurlög og serlig eyðkenni í örindalagi. Eisini er greitt frá dansi og kvöðing og um kvæðalögini. Umframt stendur greitt frá kvæðasavningini og teimum persónum, sum hvör á sín hátt var við í hesum arbeiði at varðveita okkara forna skaldskap, so hann ikki fór fyri einki í gloymsku. – Fremst í hesum bindi stendur eisini formæli, ið er stutt yvirlit yvir útgávuna, um kvæðaskaldskapin, savningararbeiðið o.a.
Til útgávuna skrivaði D. Niclasen samandráttir av kvæðunum. Hesin tekstur er settur framman fyri kvæðini, ið talan er um. Hetta er gjört til leiðbeiningar og samandrátt av kvæðisevninum í hvörjum einstökum föri. Hetta kenna vit eisini frá undangongumonnunum: J. C. Svabo í sínum kvæðasövnum frá 1770-unum og 1780-unum, Jákupi Jakobsen í bók síni um Nólsoyar-Páll frá 1908–1912 og J. Patursson í teimum 5 kvæðabókunum, sum hann legði til rættis fyri Föroya Lögting í 1922, 1944–45 og í Gyltubók fyri Noregs Ungdomslag í 1925.
Kvæðakön vita, at serstakliga eldri kvæði hava ikki verið kvöðin heilt eins í teimum ymsu bygdunum ella oyggjunum. Tá hesi kvæði í síni tíð vórðu fest á blað av kvæðasavnarum, komu tey tískil at vera uppskrivað við frávikum eftir tí, sum ymsir kvöðarar kundu minnast. Hesi kvæði við sínum frábrigdum (variantum) hvört frá öðrum vóru sjálvsagt tikin við upp í tey sövn, sum kvæðaútgávur okkara nú í tíðini umfata. Soleiðis hevur eisini verið í öðrum londum, har hetta sama er kent, t.d. í Danmörk, har Svend Grundtvig stóð fyri vísindaligu útgávuni av Danmarks gamle Folkeviser frá miðjuni av 19du öld og frameftir og eisini kendur her hjá okkum fyri sín stóra áhuga fyri Föroya fólki, tess máli, skúla og varðveittu fólkamentan, herundir Föroya kvæði.
Hjá teimum, sum gera kanningar um kvæðini, teirra evni, mál og uppruna, kunnu frábrigdini mangan hava stóran áhuga, ikki minst tá leitað verður til skrivaðar keldur fyri at finna fram á slóðir í fornum bókmentum og her kunna fáa hóming av, við hvört góða greiðu á, hvaðan okkara ónevndu kvæðaskald í forðum hövdu vitað at finna sær kvæðaevnið.
Kvæðahugaðir föroyingar kunnu sostatt eisini finna frægd í at duga ella eiga tað ella tey kvæði við ávísum frábrigdum, sum forfedrar teirra áttu og varðveittu í minnunum og kundu kvöða við sínum sermerktu eyðkennum í orðalagi og orðavali. Við at eiga variantarnar saman og kunna gera samanberingar, kann áhugavert innlit fáast í forna föroyska skaldskaparliga list við sínum virðismikla orðaskatti, ið er djúptökin bruður at leita til hjá okkum enn eins og hann var hjá teimum, sum fyri árum síðan tóku ódnartök fyri at skapa gróðrarbotn og haldgott stöði at grunda nýggjar og virðismiklar bókmentir í óbundnum sum bundum máli.
Um kvæðini annars kann sigast, at tey stava frá eldri sum yngri tíð. Tey elstu kvæðini hava uppruna sín heilt afturi í miðöld. Vit vita einki um tey eldru kvæðaskaldini, men við at kanna kvæðatekstirnar kunnu vit fáa eina hóming av lívi teirra og hugsan. Alt, sum kann geva okkum kunnleika um fortíð okkara fólks, hevur största áhuga hjá mentaðari tjóð, ið vil kennast við sjálvan seg og egna samleika sín.
Okkara fornu kvæði eru bestu keldur til kunnleika um okkara föroysku tungu langt aftur í tíðina. Tey kunnu geva okkum fatan av fedranna hugaheimi, lyndi og kenslum. Her kemur fram í ljós fólksins andliga lív í gleði og sorg og áskoðan um kærleik og hatur, trúskap og trúloysi, svik og níðingsverk. Men her fáa vit eisini at kenna treysti og manndómsbrögd, reystleika og dirvi.

**Umframt teimum, sum síðan 1998 hava sett seg fyri FÖROYA KVÆÐI, letur BÓKAGARÐUR framvegis enn standa einum og hvörjum kvæðahugaðum manni sum kvinnu í boði at kunna ogna sær hetta valaverk, hesa tjóðskaparligu fólkaútgávu, sum kann gerast öllum, ið duga at meta um og virða Föroya fólks mentan og mál, ein dýrgripur.**

## BÍLEGGINGARSEÐIL

Undirritaði, sum við hesum skrivar seg fyri at keypa FÖROYA KVÆÐI, ynskir at velja henda gjaldingarháttin fyri tey fyrstu 20 bindini, sum eru komin.

☐ at gjalda við móttökuna fyri FÖROYA KVÆÐI 20 bind við postkrav kr. 3.600,-

☐ at gjalda við móttökuna fyri FÖROYA KVÆÐI 20 bind við postkrav kr. 900,- og restina við kr. 180,- um mánaðin í 15 mánaðir

Setið x við tann gjaldingarhátt, tygum ynskja at nýta.

Navn:...................................................................................................Telefon:...............................

Bústaður:...........................................................................................................................................

Bókagarður
Postrúm 369
110 Tórshavn
Tlf.327103